# Tað stendur til at bresta í spenningi

**Bæði umborð á Sølmundi og Stráluni halda teir, at tað eru fleiri aðrir møguleikar fyri vinnarum, enn teir báðir bátarnir, sum kappast um FM heitið**

6-MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*


*Eingin kapping seinnapartin í dag verður so avgerandi fyri meistaraskapin, sum tann ímillum 6–mannaførini við monnum. Strálan er tvey stig undan Sølmundi, og tað er greitt, at annar hesi báturin verður meistari*

Eingin kapping seinnapartin í dag verður so avgerandi fyri meistaraskapin, sum tann ímillum 6–mannaførini við monnum. Strálan er tvey stig undan Sølmundi, og tað er greitt, at annar hesi báturin verður meistari.

Men bæði formaðurin umborð á Sølmundi, Petur Hansen, og formaðurin umborð á Stráluni, Kristian Kristiansen, vísa á, at tað ber væl til at ímynda sær, at onkur annar bátur fer at troðka seg heilt fram í oddin í ólavsøkuróðrinum:

– Tað hevur verið tætt allar ferðirnar. Bara sekund og minni enn tað hava verið munurin ímillum bátarnar, og tí kann tað fara fleiri vegir. Riddarin hevur í fleiri kappingum verið frammarlaga leingi. Nú er teinurin væl styttri, enn hann plagar at vera, so tað kann hugsast, at teir verða vandamiklir. Og so er tað Páll Fangi, sum rættuliga tykist hava funnið stevið tær seinastu ferðirnar, vísa teir báðir á.

### Fyritreytirnar stóran týdning

Strálan hevur 30 stig, og Sølmundur hevur 28 stig. Tað vil við øðrum orðum siga, at Sølmundur skal vinna, um hann sjálvur skal gera meistaraskapin av.

Strálan, sum vann FM heitið í fjør, hevur bestu kortini á hondini. Undan ólavsøkuróðrinum í fjør varð víst á, at Strálan ongantíð hevði vunnið á ólavsøku. Nú ber ikki til at vísa á hetta, tí Strálumenninir vunnu ólavsøkuróðurin í fjør.

Men tað hevur gingið eitt sindur upp og niður hjá Stráluni og Sølmundi í ár. Bátarnir hava so at siga skiftst um at vunnið.

– Vit halda, at líkindini hava havt nógv at siga. Tá tað hevur verið eitt sindur ófriðarligt, hevur tað ikki roynst so væl hjá okkum. Manningin hjá okkum er lættari, enn hon er t. d. umborð á Stráluni, og vit hava ein lættari bát. Tað hevur eisini sæst aftur, tá tað hevur verið mótvindur, meðan tað hevur roynst væl hjá okkum, tá hann hevur verið undan, sigur Petur Hansen umborð á Sølmundi.

Umborð á Stráluni vísa teir á, at tað sjálvandi hevur týdning, at Sølmundur bara vigar 200 kilo, meðan báturin hjá strandingum vigar 295 kilo. Og so skal tað leggjast afturat, at miðal vektin á Strálu monnunum er eitt sindur hægri, enn hon er umborð á Sølmundi.

### Kenna teinin

Bæði teir umborð á Stráluni og teir umborð á Sølmundi hava verið á Havnarvág í hesi vikuni og róð túsund metra málið, sum bara er 900 metrar, nakrar ferðir.

– Stýrimaðurin hjá okkum, Jákup Vágsheyg, hevur róð kapp við bátum í Havnini í átta ár, so hann veit, hvat tað snýr seg um í ólavsøkuróðrinum, vísir formaðurin umborð á Sølmundi á.

Teir eru kortini ikki heilt álvuligir í NSÍ:

– Vit eru tveir, sum hava verið eitt sindur slakkir tveir dagar í hesi vikuni, men nú eru vit komnir fyri okkum aftur. Tað er sjálvandi ikki so gott, men vit vóna ikki, at tað fer at bila.

Umborð á Stráluni vita teir væl, hvat teir skulu fáa betri tak á, enn teir hava havt:

– Á so stuttum teini hevur tað so sera stóran týdning, at starturin er góður. Higartil í ár hevur starturin hjá okkum verið syndarligur so at siga hvørja ferð. Vit hava ikki gjørt annað síðani vestanstevnuna enn at venja startin, so nú vóna vit, at hann fer at eydnast hesa ferð, sigur Kristian Kristiansen, bátsformaður umborð á Stráluni, sum liggur best fyri og harvið hevur góðan møguleika at endurvinna FM heitið, sum teir vunnu í fjør.

## 6-mannafør dreingir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Strálan | 1G | 30 |
| 2. | Sølmundur | | 28 |
| 3. | Riddarin | | 20 |
| 4. | Páll Fangi | | 9 |
| 5. | Snopprikkur | | 4 |
| 6. | Gongurólvur | | 3 |
| 7. | Fortuna | | 2 |
| 8. | Fuglfirðingur | | 0 |
| 9. | Kollfirðingur | | 0 |
| 10. | Lómur | 1G | 0 |
| 11. | Hósvíkingur | | 0 |
| 12. | Víkingur | | 0 |

# Hørð kapping um útlendsku avbjóðingarnar

**Havnabáturin og kvinnurnar umborð á Páll Fanga liggja fremst í kappingini um plássini í Silly-kappingini**

KAPPRÓÐUR
*Eyðun Klakstein*

Umframt ólavsøkusigurin, gull og FM kappast nakrir av kappróðrarbátunum eisini um útlendskar avbjóðingar.

Seinastu árini hava føroyskir kappróðrarbátar verið við í kapping á Silly oyggjunum, og í ár skulu tvær manningar finnast.

Menninir kappast um annað plássið, og har hevur Havnabáturin munin í løtuni. 10-mannafarið úr Havn hevur vunnið allar róðrarnar í ár, og tí eru teir tvey stig frammanfyri Nevið Reyða, sum eina róðurin var nummar tvey. Strálan er eisini við í kappingini og hevur 30 stig.

Skalt tað eydnast Nevinum Reyða at taka Havnabátin, so skal 8-mannafarið úr Klaksvík vinna sín róður, meðan Havnabáturin ikki skal gerast nummar eitt.

Treytirnar hjá Stráluni eru enn harðari.

### Kvinnur úr Klaksvík

Hjá kvinnum eru tað manningarnar úr Klaksvík, sum stríðast um plássið í kappingini á Silly.

6-mannafarið Páll Fangi hevur munin áðrenn seinasta róðurin. Tær hava vunnið allar róðrarnar í ár, og hóast 5-mannafarið Fípan Fagra eisini hevur avrikað tað sama, so hevur Páll Fangi munin í sekundum.

Kappingin er tí hørð um ferðina til Silly, og á stutta málinum á ólavsøku er møguleiki fyri, at teir bátarnir, sum hava vunnið alt ár, verða tiknir.

Róðrarsamband Føroya skipar eisini fyri eina kapping millum dreingjamanningarnar. Vinnarin av hesi kapping sleppur til Sorøkappingina í Danmark.

Í løtuni er Tjaldrið á odda í hesi kapping, meðan Blikur er næstur. Tað eru tó sjey stig millum bátarnar, so nógv skal til, áðrenn Tjaldrið verður tikið.

# U17 landslið til Danmark

**U17 landsliðið við dreingjum fer týsdagin til Danmarkar at luttaka í norðurlendskari kapping, sum verður hildin í Vejle**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

U17 dreingjaliðið fer fyrst í komandi viku til Danmarkar at luttak í NM fyri landslið.

Á ferðini til Danmarkar skal dreingjalandsliðið spæla ímóti Englandi, Noregi og Finlandi. Harafturat verða teir avgerandi dystirnir.

Mathias Davidsen hevur úttikið spælararnar, sum skulu á ferðina til Danmarkar, og teir eru: Bergur Midjord, Ingi Højsted, Jónas Tor Næs, B36, Jóhan Petur Poulsen, B68, Tummas Pauli Olsen, B71, Marni Djurhuus, EB/Streymur, Bárður H. Joensen, Eli Thorsteinsson, Gunnar Nielsen, Páll M. Joensen, Rókur F. Jespersen, HB, Magnus Skorðalíð, LÍF, Justinus R. Hansen, NSÍ, Hanus Thorleifsson, Skála, Rasmus Nolsøe, TB, Allan Kjærbo, Poul N. Poulsen, Símun Samuelsen, VB.

U17 ferðalagið fer til Danmarkar týsdagin, og teir verða burtur í eina viku.



# Finalan skal bjarga kappingarárinum


*Allan Joensen og teir í KÍ kunnu bjarga sær árinum, um teir vinna steypafinaluna á ólavsøku.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Klaksvíkingar knýta vónirnar til, at summarsteðgurin og afturkoman av Kurt Mørkøre skal geva nýggjan íblástur**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

KÍ hevur tikið mangt takið í ólavsøkufótbóltinum. Tað hevur ofta verið lagt nógv fyri, men tað er ógvuliga langt síðani, at tað hevur staðið so nógv upp á spæl hjá KÍ á ólavsøku, sum tað ger hesa ferð.

Tá landskappingin í fjøruti árunum var øðrvísi skipað, enn hon er nú, vóru finaludystirnir okkurt árið spældir á ólavsøku, og tá var KÍ ofta partur av finaluni um føroyameistaraskapin.

### Røkka ella støkka

Hesa ferð er ikki so væl vorðið hjá KÍ. Tað hevur skorist so mikið illa hjá teimum í landskappingini, at eingin møguleiki er har at røkka einari endastøðu, sum kann bera atgongd til Europa Cup við sær. Tí er steypafinalan og sigur í steypakappingini einasti møguleikin fyri atgongd til UEFA Cup.

– Tað er heldur einki at ivast í, at tað hevði komið sera væl við í landskappingini, um vit høvdu vunnið steypafinaluna.

Tað heldur skilagóði veteranurin, Harley Bertholdsen. Síðani landskappingardystin á Svangaskarði 1. juli hevur hann drigist við ein skaða í fótliðnum. Mikukvøldið royndi hann at spæla fyrra partin av 1. hálvleiki í venjingardystinum ímóti GÍ á Tórsvølli. Tað gekk ikki væl, og í gjár sá Harley ikki ljóst upp á sína luttøku í finaluni.

Heldur tú, at tað er møguleiki fyri, at KÍ kann koppa B36?

– Tá vit spældu ímóti teimum í landskappingini, gekk tað javnt á í 1. hálvleiki. Eftir at vit fingu ein mann útvístan, gjørdist tað klassamunur, og teir vunnu 5–0. Men hesa ferð er talan um ein nýggjan dyst, sum hevur heilt øðrvísi fyritreytir. Sjálvandi er B36 favorittur at vinna, men nú hava vit betri møguleikar at avgera dystin, enn vit høvdu fyri seks vikum síðani. Eg hugsi fyrst og fremst um, at vit hava fingið Kurt Mørkøre aftur á liðið. Hann hevur evnini at fáa mál so at siga burturúr ongum. At skora hevur altíð sera stóran týdning, og ikki minst í sovornum dysti er tað týdningarmikið, heldur Harley Bertholdsen og minnir aftur á finaluna millum B36 og KÍ fyri tveimum árum síðani:

– Teirra bóltspæl fleyt í hvussu so er eins gott og kanska betri enn okkara í 1. hálvleiki. Men tað vóru vit, sum stutt undan steðginum fingu hol á, og tá Kurt Mørkøre beinanvegin eftir steðgin økti til 2–0, vóru tað vit, sum fingu eyka orku og harvið høvdu yvirskotið, meðan B36 varð trýst niður. Vit mugu bara vóna, at tað eisini hesa ferð fer at laga seg soleiðis, men tað er púra greitt, at tað verður sera torført.

– Undir venjingini í vikuni hevur tað verið hugaligt at síggja, hvussu væl Kurt Mørkøre og Alexander Djordjevic beinanvegin hava funnið saman. Vit vóna, at hetta fer at skapa tyngd í álopspartin, og so mugu vit longri afturi á vøllinum syrgja fyri at halda tættari, enn tað higartil hevur verið gjørt í landskappingini.

### Ungir og eldri

Hjá KÍ er finaluliðið samansett av spælarum í øllum aldrum. Millum teir mest garvaðu eru Jan Joensen og Harley Bertholdsen. Tað er sera ivasamt, um hesir báðir vera tøkir, tá KÍ aftur fer at spæla seg í eina steypafinalu.

KÍ hevur eisini fleiri yngri spælarar, sum hava spælt seg til meiri ella minni føst pláss á liðnum. Her verður hugsað um Hjalgrím Elttør, sum hevur bitið seg fastan á besta liðnum, Atla Danielsen, sum hevur spælt nógv seinastu tíðina, og so um Símun Joensen, sum er vorðin fastur maður í ár. Hann verður kortini ikki nógv við afturat í ár. Tað er ikki heilt greitt, um hann verður við, tá KÍ komandi sunnudag skal spæla landskappingardyst í Gundadali ímóti HB. Men tað er greitt, at hann í vikuni eftir tann dystin fer til USA at vera í eitt lítið ár.

Aðrir ungir KÍ spælarar, sum í ár hava verið á besta liðnum, eru Erling Fles og Rógvi Laksáfoss.

Men í morgin verður størsta ábyrgdin løgd á royndu menninar, og ímillum teirra er liðformaðurin, Allan Joensen, ein hin týdningarmiklasti. Allan hevur verið skaddur seinastu tíðina. Teir hava spart hann eitt sindur undir venjing, men í hesi vikuni hevur hann vant við fullari ferð. Liðformaðurin verður við. Spurningurin er í hvørjari ketu Tomislav Sivic ætlar at brúka hann. Allan styrkir um verjupartin, miðvøllin og um álopið.

### Fyrireikingarnar

Nú eru tað tvær vikur síðani, at klaksvíkingar fóru at venja á nýggja graslíkinum, sum teir eru væl nøgdir við. Mikukvøldið vóru teir á Tórsvølli, og í gjárkvøldið skuldu teir út á Svangaskarð. Har skuldu teir venja, sova og aftur venja. Í dag gongur leiðin norður aftur, og so fara teir aftur um Leirvíksfjørð fyrrapartin í morgin.

Klaksvíkar kommuna vísir ítróttinum stóran ans. Tað er vorðið siður, at liðini, sum standa fyri týdningarmiklum dystum, verða bjóðaði í býráðshøllina til ábit og hugna. Soleiðis var tað eisini í hesi vikuni. Hóskvøldið vóru bæði menninir og kvinnurnar hjá KÍ til háborðs hjá kommununi. Borgarstjórin hevur í hesum sambandinum bara ein hatt – tað hevði verið verri, um HB hevði verið mótstøðuliðið, tí so hevði verið neyðugt við pápa hattinum! – meðan vara borgarstjórin hevði fleiri hattar at velja ímillum. Men sambært hann sjálvan, so var tað ikki FSF bossa hatturin, sum var uppi á, men heldur Klaksvíks húgvan, tá hann royndi at seta mót í KÍ liðini.

Seinnapartin í morgin verður tað FSF formaðurin, sum verður vertur fyri finalunum báðum.

# Tórsvøllur til reiðar


*Poul Michelsen hevur seinastu dagarnar hjúkla um grasvøllin á Tórsvølli*

Tórsvøllur fer á ólavsøku at verða karmur um steypafinaluna í fótbólti fyri aðru ferð

Ársins fótbóltsdystur higartil verður á ólavsøku. Tá fara KÍ og B36 at spæla steypafinalu, og roknað verður við sera nógvum fólki.

Forsølan av atgongumerkjum hevur gingið sera væl, og um veðrið verður til vildar er ikki óhugsandi, at Tórsvøllur verður stappaður við fólki.

Sjálvur vøllurin er í góðum standi, og seinastu dagarnar hevur formaðurin í Grunninum Tórsvøllur, Poul Michelsen, hjúkla um grasteppið.

Umframt steypafinaluna skal Tórsvøllur eisini hýsa dystinum millum HB og Hvidovre, sum verður spældur leygarkvøldið.

**ek**